# Samband við hugmyndafrøði ynskist

**Niels Juel Arge**
*Hoyvík*



Leiðarin í Dimmalætting hósdagin vil vera við, at Tjóðveldisflokkinum væntar hugmyndafrøði/ideologi. At einki meira er hjá flokkinum at stríðast fyri, tí fullveldiskósin frá 98 ikki á hesum sinni bar á mál, og at ósemjurnar í flokkin prógva, at ballið er buið. Eg meini tað. So hevur man eisini hoyrt tað - frá sambandsflokkinum, tann flokkurin í Føroyum, ið man hava minst upp á seg ideologiskt. Tó sagt við tí fyritreyt, at íhald og afturhald ikki verða roknaði sum ideologi.

Og fyri líkasum at gera eitt elegant sveiggj við halanum, dregur leiðarin býráðspolitikkin hjá Tjóðveldisflokkinum upp í. Sambært leiðaranum - sum Ingi Samuelsen, blaðstjóri, mær kunnugt plagar at skriva - eigur Tjóðveldisflokkurin ikki at bjóða seg fram til eitt kommunustýrisval, tí tað í løtuni er ófriðarligt innanfloks, og tí at flokkurin onga hugmyndafrøði skal hava. Makan til skvaldur kann man ikki lesa aðrastaðni enn í leiðaranum í Dimmu, og man má bara staðfesta, at á leiðararókini á Dimmu trívist framvegis hetta ófatuliga treiska afturhaldssinnaða sambandslyndi í besta velgående.

Sambandsfólk vóna helst í hesum døgum, at man um skamma stunda sleppur at skriva nekrologin um Tjóðveldisflokkin - tí at ein ósemja í floksleiðsluni er løgd víðopin fyri almenningin. Fyri eina ordans skuld skal tó sigast, at tað ikki er serliga virðiligt fyri flokkin at varpa slíkar tápuligar ósemjur út um allar geilar. Taktist er tað púra burtur úr vón og viti, men soleiðis hava nú onkrir persónar valt at avgreiða sínar ósemjur. Tað er torført at tiga við afturvirkandi megi og enn torførari, tá tað er fest á alment pappír. Men harífrá og til at avskriva ein heilan politiskan flokk, veit sjálvt blaðstjórin á Dimmu er ein tápulig niðurstøða. Tað verður neyvan innihaldið í einum leiðara í Dimmalætting, sum ger av við Tjóðveldisflokkin.

Hugmyndafrøði ella ei; tað er uttan iva nyttuleyst at kjakast við Dimmustjórar um tað. Sannføringin er jú grótsambondsk. Men teir kunnu klikkja seg inn á stevnu og stevnumið Tjóðveldsiflokins á www.tjodveldi.fo. Heilt so fáfongd og mangulfull, sum Dimmuleiðslan ger hana til, eru tey sjálvandi ikki.

At enda átti tað verið nóg mikið at staðfest nakrar fáar óreingiligar sambandskar sannleikar, bara fyri at vísa á, hvussu tvørur og afturhaldssinnaður Sambandsflokkurin hevur verið gjøgnum tíðirnar: Merkið varð ynskt, har piparið grør ("Hvat er galið við Dannebrog?"). Fiskimarkið vildi man ikki hava víðkað ("Hinar tjóðirnar fara at isolera Føroyar!"). Ráevnini í undirgrundini vildi man ikki hava ræðið á ("Tað er at siga Ríkisfelagsskapin upp!"). Og tá havi eg ikki nevnt føroyska málið ("Vit vilja hava danskt sum 1. mál!"). Hevði Sambandsflokkurin havt makt, sum hann hevur havt akt, var Føroyar framvegis eitt danskt amt ("Danmark er et dejligt land!" - eg eri samdur). Vorðið sum hugmyndafrøði!

## VIÐMERKINGAR

# Vit fylkjast á frælsisleið

**Rúni Nielsen**
*Landsnevndarlimur í Unga Tjóðveldinum*



**Sóknast hevur í seinastuni verið eftir leiklutinum hjá Unga Tjóðveldinum í trætumálinum millum tingmenn floksins og onnur. Sum so tíðum áður nevnt, eru Tjóðveldisflokkurin og Unga Tjóðveldið ikki júst hitt sama.**

Tjóðveldisflokkurin er ein politiskur flokkur við stevnu í fólkaviljanum frá 1946. Tjóðveldisflokkurin hevur 8 umdømisvaldar tingmenn í Føroya Løgtingið, umframt eitt umboð sitandi í Danska Fólkatinginum. Tjóðveldisflokkurin stendur til svars fyri tingmonnum og limum sínum - og øvugt.

Unga Tjóðveldið er felag teirra ungu, ið fylkjast á frælsisleið. Unga Tjóðveldið er ein rørsla, sum byggir á fólkaviljan frá fólkaatkvøðuni 14. september 1946. Unga Tjóðveldið er ikki nakar politiskur flokkur, og limaskapur í Unga Tjóðveldinum er ikki neyðugur felagsnevnari fyri limaskapi í Tjóðveldisflokkinum. Unga Tjóðveldið stendur ikki til svars fyri Tjóðveldisflokkinum, og Tjóðveldis-flokkurin stendur ikki til svars fyri Unga Tjóðveldið.

Av hesum hevur Unga Tjóðveldið ikki vilja tikið lut í villuvavstrinum av ákærum, politiskum og persónligum brigsli, fyri- og ímótilesarabrøvum og stingandi greinum og útsøgnum í bløðum og loftmiðlum.

Unga Tjóðveldið er, sum áður sagt, felag teirra ungu sum fylkjast á frælsisleið, og taka tí ikki lut í nøkrum, sum kann spjaða frælsisrørsluna.

# Stem på »Ein Færing«!

**Mogens Tilsted Christensen**
*Sognepræst, Nordstrømø prestagjald*



Jeg er meget ked af, at det har såret nogle få færinger, at jeg som præst har udtalt sig om det amerikanske valg og forsvaret en kristen præsident i USA.

Men jeres bekymringer er ganske grundløse.

En præst skal jo forkynde det kristne evangelium og kommentere verdens begivenheder set i det evangeliske lys. Det var det, jeg gjorde.

OG BUSH BLEV I HØJ GRAD GENVALG FORDI, HAN ER EN PERSONLIG KRISTEN.

Kære gode færøske sognebørn og venner, jeg holder utroligt meget af jer alle samme, og jeg tror, at I alle ved, at jeg elsker Færøerne.

Lad eftertiden vise, om jeg har ret i min glæde over, at USA genvalgte en mand af en præsident, som så klart turde stå fast på de kristne principper i en tid, hvor mørkemænd og mørkekvinder ligefrem ønsker, at der skal indføres vielser i kirkerne af homoseksuelle, og hvor visse mennesker endnu ikke har opdaget, at der bliver myrdet alt for mange uskyldige børn i verden (abort).

Men samtlige amerikanske kristne kirker støttede deres præsident George W. Bush. Selv om John Kerry var katolik og tidligere messedreng, så opfordrede den katolske kirke deres kirkegængere at stemme på Bush også, fordi han så klart stod for de kristne principper.

Det var amerikanerne, der skulle stemme om deres præsident, og for så vidt kan vi måske være lige glade.

Men ethvert kristenmenneske i verden kan kun og bør juble over, at amerikanerne som den frie verdens lokomotivfører så suverænt genvalgte deres genfødte kristne præsident.

Verden blev bedre for fire år siden, da det amerikanske folk valgte den præsident, der skabte sikkerhed for USA og en bedre verden for de øvrige muhamedaner-vildførte nationer, og som foreløbig har fældet talebanforbryderne i Afghanistan og den store stygge Saddam i hullet i Irak samt hjulpet Israel til en nogenlunde værdig tilstand efter alle de selvmordsangreb, der har fundet sted i Israel.

Glem ikke kære venner, at USA den 11. september 2001 også blev angrebet af selvmordterrorister, hvis mål udover World Trade Centers ødelæggelse også var Det Hvide Hus og FBI´s/CIA´s hovedkontor.

Glem heller ikke, at de hellige muhamedanske krigere har erklæret demokratiet for »Hellig Krig«.

Glem heller ikke, at Israel er det eneste demokrati i Mellemøsten.

Glem heller ikke, at Færøerne, når det kommer til stykket er en god kristen nation, som har en særdeles human lovgivning omkring barnemordene, som ganske enkelt ikke er tilladt sådan uden videre her på Færøerne, hvor der skal være væsentlige grunde til stede, før man lader en kvinde udsætte sig selv for både fysiske og psykiske overgreb ved at fjerne hendes barn inde i hendes egen mave.

Når det kommer til stykket, så vil eftertiden indse, at George W. Bush er vor tids ≈Winston Churchill≈, som nemlig var den statsmand, som også turde udrydde det onde i verden.

Glem heller ikke, at jeg om nogen danskere kan være det er en færing »Ich bin ein færing«.

Ref. Artikel fra slutningen af oktober:

Ein Færing!

Løsning fra Løsning √ bist du ein Færing?

Sognepræst Henrik Højlund fra Løsning har måske løsningen!

Kan man løse samfundsbånd til Færøerne?

Således spørger sognepræst Henrik Højlund fredag 22-10 i Kristeligt Dagblad under overskriften "Ich bin ein Færing!"

Link: http://www.kristeligt-dagblad.dk/debat/artikel:aid=231291

Der er nok mange, der kunne tænke sig at løse samfundsbånd til Færøerne.

Mennesker kan løse sognebånd, så de principielt tilhører et andet sogn - eller en anden præst inden for folkekirken.

Men kan man også løse samfundsbånd?

Ja absolut. Åndeligt set kan man sagtens være en færing - og med god grund, skulle jeg hilse at sige.

Færinger er overalt i de kirkesamfund, hvor ordet forkyndes både i Danmark, Norge, Island og på Færøerne.

Og jeg kan med sikkerhed også tilføje, at de har et ganske anderledes kærligt og menneskeværdigt forhold til andre mennesker og livet, end det officielle EU-familiære Danmark har.

Det gælder principielt også angående abort, homoseksualitet og kristendom.

Færinger mønstrer 5 gange så mange kirkegængere i forhold til indbyggerantallet, end Danmark gør i gennemsnit.

Færinger lever 2 år længere i gennemsnit, end danskere gør.

Færinger myrder ikke små børn i flæng. De føder dem normalt og tager sig af dem.

Enhver kan blive ein »Færing« hvor de end bor!

At være ein »Færing« er at leve Gud nær.

Derfor er min opfordring her før valgdagen:

Stem på »ein Færing« √ altså i ordets betydning √ en kristen politiker.



# Skiljing og misskiljing

**Kanska eitt sindur komiskt, men kortini so markleyst irriterandi, at orðið skiljing av fiski á landi og skiljing umborð á skipum í greinini í blaðnum í gjár í fleiri førum er komið skeivt fyri. Tískil eru eisini orð løgd ávísum persónum í munnin, sum ikki samsvara við tað, teir vildu siga og søgdu**

SKILJING AV FISKI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vit venda aftur til ráðstevnuna, sum Føroya Banki skipaði fyri fríggjadagin á Hotel Føroyum, har kjakið eftir framløgurnar serliga snúði seg um skiljing av fiski.

Í sonevnda "fiskapakkanum" hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, er ætlanin at strika kravið um, at bara føroyingar og føroysk feløg kunnu bjóða á uppboðssølu í Føroyum. Hetta merkir, at útlendingar í framtíðini eisini skulu kunna bjóða upp á fisk í Føroyum. Málið er, at størri kapping skal verða um fiskin.

Landsstýrismaðurin ætlar eisini, at fiskur, sum verður boðin út, skal verða støddarskildur frá 1. apríl 2005 at rokna, upsin tó frá 1. september 2005. Somuleiðis ætlar landsstýrismaðurin, at allur fiskur skal góðskumetast frá 1. september 2006 at rokna.

Bjørn Kalsø leggur dent á, at enn hevur "fiska-pakkin" ikki verið til hoyringar hjá vinnuni, og tí er ikki vist, at hann verður gjøgnumførdur júst soleiðis, sum hann fyriliggur í dag.

– Vit fara ikki at leggja okkum út í, hvar fiskurin verður støddarskildur, áðrenn hann verður bjóðaður út – antin tað verður umborð ella í landi. Hetta verður upp til vinnuna sjálva at avgera, sigur hann.

### Misskiljing

Undirritaði noyðist at viðganga, at nakrir av teimum, sum úttalaðu seg á ráðstevnuni hjá Føroya Banka um skiljing, eru misskiltir – á tann hátt, at bland er komið í um skiljing sum heild og skiljing umborð á skipum og bátum.

Málið hjá landsstýrismanninum snýr seg um støddarskiljing sum heild – tað, at fiskurin verður støddarskildur, áðrenn hann verður boðin út.

Í kjakinum, sum var á ráðstevnuni, tosaðu nakrir vinnulívsmenn um skiljing sum heild – og aðrir tosaðu um skiljing umborð.

Árni Joensen er formaður í ráfiskaseljarafelagnum. Í nevndu grein varð hann endurgivin fyri at siga, at skiljing umborð verður ein "niðurflokking" av fiskinum. Hetta er ikki rætt. Tað, sum hann sipaði til, er, at tað er ein niðurflokking, um fiskur, sum er einar 8-10 dagar gamal, verður stoyttur úr kassunum á eini landingarmiðstøð og skildur umaftur, tí hetta fer so illa við fiskinum.

Jóhannes Olsen, stjóri á P/F Snodd, varð eisini endurgivin fyri at siga, at myndugleikarnir eiga ikki at seta lóg ella kunngerðir í verk sum krevja, at fiskurin verður skildur umborð.

Endurgevingin er røtt, men orðið "umborð" skuldi ikki vera við, tí hetta snýr seg sum nevnt um støddarskiljing sum heild.

Eg eri ógvuliga harmur um, at eg í endurgevingini ikki nýtti orðið støddarskiljing "generelt" – og uttan at hefta meg við, um talan er í landi ella umborð á skipi.

Hetta er eitt eymt mál millum ráfiskaseljarar og keyparar, og tí er tað tvífalt so keðiligt, at eg hesaferð ikki ansaði betur eftir.

Men rætt skal vera rætt; tað vóru eisini teir, sum í kjakinum burtur av tosaðu um støddarskiljing av fiski umborð.

Eg biði tykkum, eg gjørdi órætt, halda mær til góðar.

# Krúnborg lastar nú 3200 tons



*Nú Krúnborg er longd, telist skipið millum størstu skip av hesum slagi í Norðuratlantshavinum*
*Mynd: Jan Muller*

**Kombineraða nótaskipið og trolarin, Krúnborg, er komin aftur av Gryfia-Skipasmiðjuni í Pólandi, har skipið er longt við 7,8 metrum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Petur H. Jacobsen, reiðari, sigur, at Krúnborg nú er tilsamans 82,05 metrar long og 14 metrar breið.

– Fyri leingjanina lastaði skipið 2500 tons, men nú vænta teir, at skipið lastar heili 3.200 tons, sigur hann.

Krúnborg telist við hesum millum størstu skip av hesum slagi í Norðuratlantarhavinum.

Reiðarin sigur, at skipið hevur verið úr vinnu í einans tveir mánaðir, og hann er ovfarin av, hvussu skjótt ein slík leingjan kann lata seg gera.

- Sambært ætlanini skuldi skipið enntá verða liðugt innan seks vikur, men tann ætlanin helt so ikki heilt.

Hann sigur, at pólendingar hava bygt sektiónina, meðan Krúnborg hevur verið í vinnu, og tá ið sektiónin var liðug, fór skipið til Pólands.

Petur sigur, at Krúnborg er kubbað av nakað væl aftanfyri miðjuna á skipinum, nevniliga har skipið er djúpst, og síðan er sektiónin sett uppí.

– Arbeiðið er longt sambært krøvum hjá Veritas, og tað merkir, at tað er styrkt, har sektiónin er sett uppí.

Skrokkurin til Krúnborg er bygdur á somu skipasmiðju, har skipið nú er longt.

Petur sigur, at teir høvdu trý tilboð uppá leingjan av skipinum. Tvey vóru úr Noregi uppá ávikavist 10 og 13 miljónir, men arbeiðið, sum nú er gjørt í Pólandi, kostar 7 miljónir krónur.

Hann heldur, at hetta er ógvuliga væl sloppið í mun til kapasitetin, sum fæst fyri peningin.

Týsnáttina fór skipið aftur til fiskiskap. Teir fóru í norskan sjógv á makrelveiði, har teir hava eini 900 tons eftir av kvotuni.

Petur H. Jacobsen veit at siga, at flaggskipið í norska fiskiskipaflotanum, Libas, er 16 metrar breiður og einar 93 metrar langur.

- Í dag telist Krúnborg millum størstu skip av hesum slagi í Norðuratlantshavinum, sigur reiðarin.

## Handilsstongsul móti Somalia

Gongst, sum Løgtingið ætlar, verður bannað føroyingum eitt nú at selja afrikanska landinum, Somalia, vápn.

Í løtuni liggur eitt lógaruppskot í Tinginum, sum leggur upp til handilslig revsitiltøk móti Somalia. Ætlandi verður uppskotið endaliga samtykt mikudagin.

Fyrsta grein í uppskotinum sigur m.a., at tað er bannað at selja ella at royna at selja, avhenda, flyta ella á annan hátt at veita Somaliu vápn og hernaðarútbúnað umframt ein og hvønn líknandi útbúnað. Eisini er bannað at selja lóður, hernaðarakfør og hernaðarútgerð, hálvhernaðarliga útgerð og eykalutir til nevndu hesar lutir.

Tað er danska uttanríkisráðið, sum umvegis ríkisumboðsmannin í Føroyum hevur heitt á Løgmansskrivstovuna um at skipa so fyri, at Føroyar fremja ávís handilstiltøk ímóti Somaliu, samsvarandi eini samtykt hjá Trygdarráði Sameindu Tjóða, skrivar heimasíðan hjá Sparikassanum.

Orsøkin til revsitiltøkini er drúgva vápnaða stríðið í afrikanska landinum.

## Kaupthing víðkar í Noreg

Tað er ikki bara her heima, at íslenski bankin Kaupthing merkist í fíggjarheiminum. Sambart norska Aftenposten, so eru Kaupthing og Islandsbankin av álvara á veg inn á norska marknaðin.

Teir hava báðir longu framt minni keyp at norskum fíggjarfyritokum seinasta árið, og Islandsbankin er júst við at yvirtaka KredittBankan, sum heldur til í Alesund okinum.

Kaupthing Bank, sum sambart Financial Times er skjótast vaksandi bankin í heiminum, hevur fingið 5,1 miliard í nýggjum kapitali, og víðkan av virkseminum í Norra er ovast á ynskilistanum hjá leiðsluni. – Vit ynskja somu stóðu á norska marknaðinum, eftir trimum til fimm árum, sum vit hava í Svoríki og Danmark‰ sigur stjórin fyri Kaupthing samtakið, Hreidar Mar Sigurdsson.

**-tn**